# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Michaela Sørensen givin á Føroya Tele



1. juni gavst Michaela Sørensen á Føroya Tele eftir at hava arbeitt á stovninum í 23 ár. Michaela, f. Davidsen, er ættað av Sandi. Honn flutti sum 17 ára gomul til Havnar, hetta var í 1954. Í 1955 fekk hon starv á Telefonverki Føroya Løgtings, sum fyritøkan æt tá. Har arbeiddi hon til 1959 í fyrsta umfari. Hon var heima meðan børnini vóru smá, men arbeiddi á stovninum í fleiri tíðarskeiðum sum avloysari. Seinastu 14 árini, síðan 1989, hevur hon arbeitt fast hjá Føroya Tele. Michaela hevur sostatt arbeitt á stovninum í 23 ár í einum tíðarskeiði frá 1955-2003. Hennara uppgáva hevur verið at passa telefontænastuna sum t.d. nummarkall og aðrar tænastur. Seinastu fimm árini hevur hon arbeitt á Tænastumiðstøðini, ið er á somlu Telegrafstøðini við Tinghúsvegin. Michaela er gift við Janus Sørensen, vatnmeistara hjá Tórshavnar Kommunu, hann er ættaður úr Trongisvági. Tey eiga fýra børn: Jan sum býr í Hoyvík, Majken sum býr í Fraklandi, Leif sum býr í Havn og Anni sum býr í Hoyvík.


# Útbjóðing

Vegna Sp/f Høgna Mikkelsen, byggimeistara, verður arbeiðið Berjabrekka 3. stig boðið út at gera í høvuðsentreprisu.
Lisitatiónin verður almenn.

Talan er um 8 íbúðarblokkar, í 3 hæddum, við tilsamans 68 íbúðum, við tilhoyrandi vegi, p-plássi og fríøki.

**Arbeiðið umfatar:**
Avgrevstur, boring og spreinging, planering, koloakkir og installatiónir, stoypi - og betongelementararbeiði, og veg- og laendisfestisarbeiði.

Útbjóðingartilfarið skal bíleggjast hjá HMP-Consult Sp/f innan mánadagin 9. juni, og verður útflýggjað móti eini kvittan um, at eitt veðhald á kr. 15.000,- er sett á konto nr. 6460.166310.2 í Føroya Banka

Tilboð í afturlatnum brævbjálva, merktur "Berjabrekka 3. stig" skulu vera HMP-Consult Sp/f í hendi í seinasta lagi mánadag 30. juni 2003 kl. 15.00
Lisitasjónin verður á skrivstovuni hjá HMP-Consult mánadagin 30. juni 2003 kl. 15.00

Veðhaldið fæst aftur, um útboðstilfarið verður latið óskalað inn aftur í seinasta lagi 14 dagar aftaná lisitasjónina



**ARKITEKTAVIRKIÐ MAGNUS HANSEN**
Gundadalsv. 13, FO-100 Tórshavn
Tel 317706 · Fax 317706
Teldupostur: mhark@kallnet.fo

**RÁÐG. VERKFR. HMP-CONSULT Sp/f**
Óluvugøta 12, FO-100 Tórshavn
Tel 312279 · Fax 318346
Teldupostar: hmp@hmp-consult.fo


## Føðingar

21. mai fingu Bjørg Joensen og Peter Rosenfeldt Jensen, Søborg, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2460 gr.

26. mai fingu Jens Kjartan Feilberg og Vivian Tausen, Søldarfirði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

27. mai fingu Mona og Jón Rasmussen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3460 gr.

28. mai fingu Mary Ann Mathisen og Bárur Andreasen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3560 gr.

29. mai fingu Rannvá Lamhauge og Benjamin Gøte, Søldarfirði, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3600 gr.

30. mai fingu Gunvør og Dánjal Norðberg Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 4835 gr.

31. mai fingu Patricia og Hendrik Húsgarð, Skagen, eina dóttur. Hon var 37 cm long og vigaði 1352 gr.



*31. mai fekk Anna ein lítlabeiggja. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr. Foreldur teirra eru Ingun Schiller og Eirikur Lindenskov, Tórshavn.*

2. juni fingu Thyra og Ib Kristiansen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 4100 gr.

2. juni fingu Bjørk Gudmundsen og Andor Joensen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3000 gr.

2. juni fingu Anita L. Hammer og Jóhann Fagraklett, Signabø, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3520 gr.

3. juni fingu Bjarta og Trúgvi Petersen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3250 gr.

3. juni fingu Susi Jensen og Jákup á Borg, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3540 gr.

4. juni fingu Pia og Eyðun Arge, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3350 gr.

4. juni fingu Annika Petersen og Piddi Klein, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

## Andlát

29. mai
Sigbjørg Dahl, Oyri, 53 ár
30. mai
Jóhanna Katrina í Horni, Hanna í Horni, Sandavági, 88 ár
1. juni
Hilma Petersen, fødd Danielsen, Stykki, bús. í Lohals.
Hallbjørg Poulsen, fødd Jensen, Skúgvi, 83 ár
Rikka á Líðarenda, Nesi, 91 ár
3. juni
Frida Eriksen, Klaksvík, bús. í Havn, 76 ár
Maiken Højgaard, Glansberg, 37 ár
Niklas Mikkelsen, Syðrugøta, 71 ár
Wenzel Hentze, bús. í Miðvági, ættaður úr Havn, 53 ár
4. juni
Annika Brekkstein, Velbastað, 16 ár.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jákup Lindenskov 70 ár



Týsdagin 10. juni fyllir Jákup Lindenskov, fyrrverandi løgtings-, landsstýris- og fólkatingsmaður 70 ár. Hóast henda lutvíst lága aldur, so eru tað í ár liðin 45 ár síðani, at hann sum 25 ára gamal varð valdur á Føroya Løgting í 1958.

Jákup er úr Havn, sonur Edvard Lindenskov (í Rættará) og Biritu, sum var í Leynum, hóast bæði foreldur hennara vóru úr Kvívík. Jákup tók realprógv í Havn í 1950, og sama árið fór hann í læru hjá Tryggingarsambandinum Føroyar, sum tá helt til úti í Tinganesi, og hvørs starvsfólk kundu teljast á hondunum. Hann fór seinni til Danmarkar, har hann gekk á handilsskúla og arbeiddi í trygging.

Í 1958 stillaði Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hann upp sum nummar eitt til løgtingsvalið - tá varð stillað upp í nummarrøð - og hann varð valdur. Flokkurin hevði eitt sera gott val hetta árið, og Petur Mohr Dam gjørdist løgmaður. Jákup sat á tingi til valið í 1966, tá hann fall – honum tørvaðu bert níggju atkvøður. Tá Petur Mohr Dam doyði í 1968, varð Jákup valdur í landsstýrið, og varð hann aftur valdur á ting í 1970 við hálvtfimthundrað atkvøðum. Hann var landsstýrismaður í fýra landsstýrissamgongum. Í 1979 stillaði Javnaðarflokkurin hann upp til fólkatingið, tá veteranurin Johan Nielsen legði frá sær. Jákup varð valdur og legði landsstýrisstarvið, sum hann hevði røkt í 11 ár, frá sær. Jákup sat á fólkatingi í átta ár, tvey tey síðstu sum varamaður. Jákup gavst sum virkin politikari í 1994, tá hann ikki stillaði uppaftur til løgtingsvalið.

Í politikki er Jákup kendur fyri sítt varsemi - ikki minst, tá tað snúði seg um ríkismálini. Honum dámdi lítið, tá menn fóru upp at sveima í loysingarpráti – hann virkaði fyri at tryggja lívsgrundarlagið, og ríkisveitingina sá hann sum eina neyðvendigheit til tess. Hann hevur sera drúgvar royndir, sum politikari – eitt nú var ein teirra, sum í januar í 1959 fór niður at samráðast við H.C. Hansen, forsætisráðharra um almannalógirnar, sum komu í gildi sama árið – tær lógir, sum vit í dag síggja sum eina sjálvfylgju. Øll árini sum landsstýrismaður umsat hann almannamál, og tey lógu honum øll árini næst á hjarta.

Tann fyrsta løgtingsfíggjarlógin, sum Jákup var við at samtykkja á tingi var upp á 18 milliónir. Tann síðsta, hann var við til at samtykkja – tað var í 1993, var upp á 2.500 milliónir! Hetta lýsir kanska broytingarnar í samfelag okkara – og í politikki, tey árini Jákup var virkin politikari.

Eitt av málunum, sum Jákup var errin av at loysa á fólkatingi, var lógin um skaðendurgjald til teirra, ið sigldu undir krígnum. Føroyingar vórðu upprunaliga ikki fevndir av lógini, hóast teir áttu at verið tað. Saman við teimum, sum stríddust fyri at vinna hesi rættindi, eydnaðist tað Jákupi at binda danska Javnaðarflokkin til at seta hetta sum treyt fyri at atkvøða fyri fíggjarlógini hjá Poul Schlüther.

Meðan Jákup var landsstýrismaður vórðu lunnar lagdir undir fleiri batar, eitt nú lógina um dagpengar við sjúku og barnsburð, eins og deildirnar á Eirargarði vórðu bygdar at hýsa teimum menningartarnaðu, sum fram til ta tíð vórðu send av landinum á stovn í Danmark. Tey kundu nú flyta heimaftur av Rødbygaard.

Í politikki hevur Jákup sum vera man havt nógv álitisstørv, og var hann eitt nú tingformaður frá 1984-87. Tingskrivari var hann fleiri av fyrstu árunum, hann sat á tingi, eins og hann eisini var limur í Norðurlandaráðnum.

Í sínum borgarliga starvi á Tryggingini var hann við til at seta á stovn Lívstrygg-ingina – hetta var árið fyri at hann fór í farloyvi frá Tryggingini fyri at gerast landsstýrismaður – og hann var burturi frá tryggingini næstu 16 árini.

Øll árini hevur Jákup verið virkin innan fráhaldsrørsluna gjøgnum Losjuna í Havn, har rættuliga stórt ungdómsvirksemi var í fimmti og sekstiárunum. Soleiðis var hann eisini við til at stovna hondbóltsfelagið Kyndil í 1956, har hann var fyrsti formaður. Eisini var hann var eitt skifti í sekstiárunuum blaðstjóri á Sosialinum.

Jákup var í nógv ár formaður í endurbúgvingarstovninum ALV, hann hevur verið formaður í Heilbrigdinum á Velbastað síðani tað varð stovnað í 1986, hann hevur í nógv ár verið formaður í stýrinum fyri Blindastovnin, og hann er eisini formaður í nevndini fyri Eldratilhaldið í gamla Føroya Bankahúsinum í Tórsgøtu í Havn, so hóast hann er farin um pensiónsaldur, so hevur hann framvegis nógv jørn í eldinum.

Jákup Lindenskov giftist í 1961 við Jónu, f. Jacobsen úr Fuglafirði. Hon er dóttir Jóhannus Jacobsen, betur kendur sum »skómakarin«, og Ellifíu hjá Óla á Miðgerði. Jákup og Jóna eiga børnini Elin, sum býr í Havn, Biritu, sum býr í Keypmannahavn og Eirik, sum býr í Havn.

Føðingardagurin hjá Jákupi verður hildin leygarkvøldið 12. JULI í Losjuni í Havn.

## Daniella Olsen 90 ár



Í dag, 7. juni, fyllir Daniella Olsen í Havn 90 ár. Daniella er ættað av Sandi. Hon tók lærarapróqv á Føroya Lærarskúla í 1935 og var lærari á Klaksvíkar Millum- og Realskúla frá 1952-57, á Tekniska Skúla í Havn frá 1957-58, á Føroya Millum- og Realskúla frá 1958-59. Hon arbeiddi á Málstovnin-um frá 1959-61 og var lærari á Føroya Studentaskúla frá 1964-74. Daniella tók cand.mag. prógv í týskum og enskum í 1954.

## Hálvdan Gudmundsen 50 ár



Í morgin fyllir Hálvdan Gudmundsen í Sandavági 50 ár.

Hálvdan er kendur millum teirra, sum hava við skip at gera. Reiðari er hann á fýra skipum. Tey eru Venus, Mars, Vesturtúgva og Mars Chaser.

Men hann fær eisini tíð til annað. Er skúlatænari við Miðvágs Sandavágs Skúla, umframt at hann er limur í bygdarráðnum í Sandavági, har hann er formaður i teknisku nevnd.

Hálvdan er timburmaður, men hevur sum flestir á hansara aldri verið sína tíð á sjónum, Sjógvurin dróg og hann fór avstað aftur, eftir aqt hann annars var uppilagstur at smíða. Var millum annað við Heldarstindi hin vanlukkutúrin í Eystursjónum, tá teir fingu sinnopsgassið í trolið.

Frítíðaráhugamálini eru sum hjá flestum sandavágsmonnum. Seyð og gæs hevur hann gangandi, og onkran kálv verður tað saktans eisini til.

Hálvdan er giftur við Anniku, sum er úr sama grannlagi sum hann sjálvur. Tey hava altíð kenst. Bókstaviliga. Eru fødd í sama ári. Annika fer at fylla 50 seinni í ár. Børnini eru trý, og barnabørnini somuleiðis.

Føðingardagin hjá Hálvdani eru tey stødd í Skotlandi.

## Brúdleyp

Í dag, 7. juni, giftast í Vesturkirkjuni Ingunn Innerdahl Hansen, Skopun, og Petur Petersen, Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

## Prógv

4. juni tók Beinta Hovgaard, Trongisvági, prógv sum bioanalytikari á Amager Hospitali.



## Sjúrður Jacobæus útbúgvin sum lendisgartnari

1. juni 2003 varð Sjúrður Richard Samuelsen Jacobæus í Havn útbúgvin sum lendisgartnari við "anlægsteknik" sum sergrein. Hann hevur lært hjá Sp/f Hjálpirót í Hoyvík, lærutíðin var 3 ár og 10 mánaðir, harav eitt ár á Beder Gartnerskole í Århus. Lærumeistari hjá Sjúrði var Torben Schneider. Sjúrður er 22 ára gamal, føddur og uppvaksin í Havn, sonur Sólrun og Michael Jacobæus. Hann kemur framvegis at arbeiða hjá Sp/f Hjálpirót sum sveinur.

## Dagurin

**7. juni. Jeremias.** Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti. Í Føroyum hevur navnið Geramíggjas verið brúkt. Bíbilska navnið merkir tann av *Gudi upphevjaði.*

**8. juni. Medardus,** deyður í umlei 560. Biskupur í St.Quentin og Tournai í Fraklandi. Í Fraklandi er hann verndari hjá øllum teimum, sum hava víngarðar, og hjá øllum bryggjarum.

**9. juni. Primus,** deyður í umleið 300. Rómverji. Hann og bróðir hansara Felicianus vórðu illa píndir og tiknir av døgum. Primus merkir tann *fyrsti*.

**10. juni. Onuphrius,** deyður í umleið 400. Eftir halgisøguni var hann kongssonur av Blálondum, sum gjørdist kristin, segði alt frá sær og livdi til sín doyggjandi dag sum einbúgvi í egyptisku oyðimørkini.